# Tjaldur hevur keypt Vónina

**Íløgufelagið Tjaldur, sum er gamla Skipafelagið, keypti mánadagin 60% av partapeningi í P/F Vónini**

ÍLØGA
*Jákup Mørk*

Hesum boðaði Tjaldur frá í tíðindaskrivi mánadagin.

Partarnir vilja ikki siga nakað um keypspeningin, men Líggjas í Bø, nevndarformaður í Tjaldri, ásannar, at handilin langt ífrá hevur verið ókeypis.

- Tjaldur er í dag eitt íløgufelag. Tí meta vit støðugt um, hvussu virðini hjá virkinum skulu plaserast, og her hava vit mett Vónina sum eitt áhugavert virki við góðum menningarmøguleikum. Tí hava vit givið gomlu partaeigarunum eitt tilboð, og hesum hava teir tikið av. Aðrar viðmerkingar fái eg ikki gjørt í løtuni, staðfestir Líggjast.

Hóast ognarviðurskiftini soleiðis verða broytt, so verður leiðslan í felagnum fyribils tann sama. Í tíðindaskrivinum verður sagt, at allir teir gomlu partaeigararnir framvegis eiga part - tó ein minni part - í virkinum, og at bæði nevnd og stjórn verða óbroytt.

Samstundis verður upplýst, at Tjaldur í samband við keypi hevur goldið part av keypspeningi í felagið, soleiðis at hetta verður sterkari framyvir.

Eginpeningurin hjá Vónini var við árslok 2004 góðar 59 mió kr. Ársúrslitið eftir skatt var 6,5 mió kr.



MFS í Føroyahúsinum:

# Pisudagur, framløga og cafékvøld

**So er MFS aftur á palli við einum fjølbroyttum tiltaki í Føroyahúsinum**

PISUDAGUR

Fríggjadagin 30. september skipar MFS fyri pisudegi, framløgu og cafékvøldi við tónleiki í Føroyahúsinum.

Byrjað verður kl 18.30 við einum pisudegi, sum er skipaður sum eitt kunnandi tiltak fyri øll tey, sum júst eru byrjað at lesa. Her fara ymisk føroysk feløg í Keypmannahavn at greiða frá virksemi teirra, soleiðis at tey sum júst eru byrjaði á hægri lærustovni fáa innlit í, hvørjar møguleikar tey hava at hitta aðrar føroyingar mentunnarliga, ítróttarliga og fakliga. Ráðslimir í MFS verða tøkir at svara spurningum um ymisk praktisk viðurskifti, sum kunnu tykjast trupul fyrstu tíðina á einum nýggjum staði.

Kl. 19.30 fer Sámal Matras Christiansen at hava framløgu við støði í høvuðsuppgávu síni við heitinum: »Ímyndin av bústaðnum - ein case-kanning av búsetingini á føroyska meginlandinum í einari mobilari tíð«. Ein forsmakkur uppá, hvat hetta fer at snúgva seg um er viðheft niðanfyri.

Finnur Jensen (úr Páll Finnur Páll) fer at spæla aftaná. Caféin verður opin, so tað er lagt upp til eitt hugnaligt fríggjakvøld við eitt sindur av hvørjum.

## Ímyndin av bústaðnum

**- ein case-kanning av búsetingini á føroyska meginlandinum í eini mobilari tíð**

[Úrdráttur]

Ímyndin av bústaðnum er ein ekstrem og paradigmatisk case-kanning, har ein rúgva av lokalum politikkum og broytingartilgongdum í einari føroyskari bygdakommunu verða kannað. Bygdakommunurnar eru hetta seinasta áratíggjið broyttar frá at vera bygdasamfeløg til at gerast nakað, ið minnir um forstaðir. Bygdirnar á meginlandinum eru vorðnar partur av einum stórum »netverksbýi«, har ymisku bygdirnar og býirnir hava ymiskar leiklutir í hesum stóra, nærum landsumfatandi samanhangi. Men tað er munur á, hvussu ymisku kommunurnar velja at taka ímóti teimum nýggju møguleikunum og avbjóðingunum og krøvunum frá nýggju borgarunum um bústað og tænastutboð. Serliga viðvíkjandi orðingini av proaktivum og samanhangandi politikkum, er tað ein stórur trupulleiki, at nógvar av kommununum hava sera primitivar fyrisitingarligar umstøður, ella tað eg velji at kalla eina "fólksliga fyrisiting", ið hevur lyndi at vera sera stuttskygd.

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

## Stjóri til Framtaksgrunn Føroya

Fyri Framtaksgrunnin verður søkt eftir stjóra at byrja skjótast til ber.

**Um Framtaksgrunnin**

Framtaksgrunnur Føroya er ein vinnurekandi grunnur, hvørs virksemi fevnir um at gera íløgur í nýggj ella víðkað vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsiktað kapitalavkast, ið stendur mát við váðan. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir við høgum vitanarinnihaldi.

Framtaksgrunnurin er í løtuni partaeigari í 15 føroyskum fyritøkum.

Framtaksgrunnurin verður stjórnaður av einari fimm-mannanevnd, harav teir fýra verða valdir av Føroya Landsstýri. Fimti nevndarlimurin verður valdur av teimum sitandi limunum.

**Starvið**

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Framtaksgrunni Føroya við tilvísing til nevndina.

Stjórin skal í neyvum samstarvi við nevndina hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av rakstri grunnsins, herundir viðgera íløguumsóknir umframt røkta verandi íløgur.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
- hevur hollan kunnleika til vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni

**Umsóknir**

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 10. oktober 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 54 34 45.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85